# Innilæstar vakurleikadrottningar

**Nýggi leikurin hjá Grímu, Vakurleikadrottningin úr Leenane, er ein tikkandi bumba sum hóttir við at bresta heima hjá tær sjálvum**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*



*Ria Tórgarð sum piparmoyggin og Kári Øster sum heimafturkomni verðismaðurin*

*Mynd: Anna V. Ellingsgaard*

"At skriva sjónleikir er eitt slag av tignarligum arbeiðsloysi", sigur unga, írska leikskaldið Martin McDonagh. Ella segði, áðrenn heimurin fekk eyguni upp fyri hansara skaldagávum, og hann gjørdist eitt av heimsins mest lovandi leikskøldum í nýggjari tíð.

Soleiðis gongur tað í ævintýrum, men ikki í sjónleikunum hjá McDonagh. Har verður tað við dreymin um stóra kærleikan, eydnuna og at sleppa burtur.

### Tignarligur blørðubruni

Vit eru í lítla køkinum í lítla húsinum í lítlu írsku bygdini Leenane. Her ganga tey fýra Mag, Maureen, Pato og Ray og mala runt í hvør sínum lítla heimi, har tey hvør sær hava útnevnt seg sjálvan til heimsmeistara. Blørðubrunin hjá gomlu Mag hevur eina serstaka tign yvir sær, piparmoyggin Maureen er Øskufían sum bíðar eftir prinsinum, Ray er týdningarmikli boðberin av slatri og fríggjarabrøvum, og Pato kallar sína hálvsvøku piparmoyggj vakurleikadrottning. Soleiðis gera tey øll neyðsýn til dygd, tí so sleppa tey undan at royna nakað nýtt. At yvirliva sum innilæstar vakurleikadrottningar er betri, enn als ikki at yvirliva.

Í bakgrundini hoyra vit lagið "Spinning Wheel". Lívið melur í klingur, inntil Pato órógvar rútmuna eina løtu og fær lívið hjá hinum trimum at mala um seg og dreymin um at sleppa burtur frá sær sjálvum og sínum leiklutunum.



*Piparmoyggin og riddarin av tí Hvíta hestinum*

*Mynd: Anna V. Ellingsgaard*

### Lat upp for fanin!

Men trongdin at halda hvør øðrum fast í hesum leiklutum er sterkari enn dreymurin um, at okkurt nýtt skal henda. Tú veist, hvat tú hevur, men ikki hvat tú fært so best man vera at verða verðandi her. Og møðgurnar Mag og Maureen hava hvørja aðra. Mag gevur dóttrini støðuga ringa samvitsku fyri ikki at hava nóg stóra viðring fyri hennara sjúkum, og Maureen gevur mammuni skyldina fyri at hon ongan sjeik hevur. Soleiðis halda tær hvørja aðra sum gíslar í einum spæli, har fíggindaskapurin teirra millum er høvuðsreglan, sum skal káva út yvir, at spælið snýr seg um nakað heilt annað. Á sama hátt sum smarta kaskettin og stóru orðini hjá Ray káva út yvir eitt bygdafrell og slatrivætti, sum onki fær í lag. Tað er so deiligt at standa og skrála "Lat so hesa hurðina upp, for fanin", tá tað bara er hurðin inn í trygga lítla heimin hjá Mag og Maureen og ikki út í stóru verð, man buldrar á.

### Avdúking

Leikskaldið McDonagh hevur eitt serligt hegni at eyðgleiða typir, vit øll kenna, uttan at gera tær til keipumyndir. Niðriundir søgugongdini og persónunum fjalir seg ein røð av øðrum søgum og persónum, sum spakuliga fáa myndina at støkka sundur. Tað, sum við fyrsta eygnabrá, er so einfalt, at tað ríður á markinum til tað keðiliga, verður ein tikkandi bumba, og Vakurleikadrottningin úr Leenane er onki undantak.

Tikkandi bumbur er onki nýtt fyri áskoðarar. Vit mest sum vænta tað. Men vit vænta ikki, at tær bresta inni hjá okkum sjálvum, og tí skakar Vakurleikadrottningin teg meir, enn tú vilt verða við. Leenane kundi verið tín heimbygd, og Mag minnir teg ivaleyst um ommusystir tína. Vit kenna typirnar, umhvørvið og eru øll nóg bygdaslig til at duga reglarnar, sum fáa spælið, vit øll spæla, at síggja út sum okkurt annað.

Martin McDonagh hevur gjørt tað til sína sergrein at avdúka spælið og okkum øll. Og Gríma hevur tikið avdúkingina eitt hóttandi fet nærri okkum sjálvum við Vakuleikadrottningini úr Leeane, sum verður frumframsýndur næsta leygardag kl. 19.

Leikarar:
Maureen: Ria Tórgarð
Mag: Laura Joensen
Pato: Kári Øster
Ray: Hans Tórgarð

Egi Dam hevur leikstjórnað og týtt leikin og Eyðun Jóhannesen, og Kári Øster hava staðið fyri pallmyndini. Búi Dam hevur gjørt írska eyðkennislagið til leikin



# Nei til miðbýarhús við Tinhúsvegin!

## – Varðveitið Degn´s Hús

TÍÐINDASKRIV

Borgarar í Tórshavnar kommunu hava tikið stig til at savna inn undirskriftir ímóti ætlanini at flyta tey meira enn 100 ára gomlu húsini hjá Anton Degn, Degn´s Hús, á Tinghúsvegnum og í staðin byggja eini miðbýarhús í fimm hæddum.

– Vit halda, at hesin bygningurin fer at misprýða umhvørvið við Tinghúsvegin, Tinghúsvøllin, Tinghúsið og Vaglið og mæla tí frá, at Tórshavnar býráð gevur byggiloyvi til ætlanina, sigur Ingi Mohr, fyrrverandi býráðslimur. Hann er ein av teimum, ið hevur tikið stig til at savna undirskriftir fyri at mótmæla ætlanini.

Ístaðin verður mælt til at fríðka og varðveita hugnaliga umhvørvið í hjartanum í høvuðsstaðnum, Tí Deiligu Havn.

Bløð at skriva undir áheitanina til Tórshavnar býráð liggja frammi frá 12. til 20 mars í handlum, kioskum, bensinsølum, tænastustovnum, kaffístovum og aðrastaðni.

*Fyri stigtakararnar*
**Ingi Mohr**

# Føroyskt ættleiðingarfelag verður nú stovnað

TÍÐINDASKRIV

Seinastu árini er tað blivið alsamt meiri vanligt, at føroyingar velja at ættleiða børn úr útlondum. Fyri bæði foreldur og børn byrjar ein nýggj tilvera saman, sum í onkrum lutum brýtur frá tí hjá "vanligum" føroyskum familjum. Ættleiddu børnini koma frá ymiskum londum og eru ymisk til aldurs, tá tey koma til Føroya og hvørt einstakt hevur sína bakgrund og viðføri frá lívinum, áðrenn tey blivu ættleidd - hetta kann vera meiri og minni kent.

Leygardagin 3. apríl frá kl. 9 til umleið kl. 17 verður fjølbroytt tiltak fyri bæði børn og vaksin í leguhúsunum í Nesvík. Málbólkurin eru familjur við ættleiddum børnum, ættleidd ella tey, ið ætla at ættleiða. Umframt at hava stovnandi fund av føroyskum ættleiðingarfelag, verður hetta eisini ein hugnadagur við ymiskum á skránni, og ein góður møguleiki at tosa saman. Okkurt verður fyri børnini - spøl, sangur o.a. Fyri tey vaksnu verður umframt fundin viðkomandi fyrilestur v.m.

Ætlanin er, at felagið á fjølbroyttan hátt skal verða við til at samskipa felags áhugamál hjá limunum. Tað kann verða við hugnaløtum, fyrilestrum, upplýsing um ættleiðing, netverki, umboðan mótvegis myndugleikum o.s.fr.

Tað er ein mammubólkur í Havn, sum hevur tikið stig til tiltakið. Fyrsta stigið varð tikið í mai mánaða í fjør, tá ein fyrireikandi fundur varð hildin í Kommunuskúlanum í Havn. Á hesum fundinum varð ein fyrireikingarbólkur mannaður, og hava tey arbeitt við ymiskum ætlanum viðvíkjandi stovnanini av felagnum - hesum fara tey at greiða nærri frá hendan dagin.

Fyrireikarnir vóna, at nógv fara at vísa tiltakinum áhuga og at eitt føroyskt felag fyri ættleiðing fær eina góða byrjan.

Tilmelding og møguligir spurningar hjá Anniku tlf. 310 649 ella Nitu tlf. 312 705. Freistin at tekna seg er sunnudagin 21. mars. Vaksin 200 kr., børn ókeypis.

Morgunmatur, døgurði og millummál er við í luttøkugjaldinum.

# Rok á Vertshúsinum

Mikukvøldið fekk løgreglan fráboðan um rok á Vertshúsinum, og í samráð við starvsfólkið máttu politistarnir lata staðið aftur av trygdaráðum. Eingin kom til mein í bardaganum, og málið verður nú kannað

Tey, sum mikukvøldið høvdu leitað sær oman í Vertshúsið í miðbýnum í Havn, fingu alt annað enn eitt hugnaligt kvøld, hóast dramatikkinum ikki bilti nakað. Fyri einstakar kundar á Vertshúsinum hetta kvøldið gjørdist blóðið í so heitt, og úrslitið var, at farið varð til hendurs inni á sjálvum Vertshúsinum. Sambært øðrum stjóranum, Óla Svend Nolsøe, komu sjey mans inn og vildu konfrontera onkran av kundunum við okkurt, men løgreglan fekk beinanvegin skil á støðuni.



Løgreglan fekk fráboðan um 11 tíðina mikukvøldið, og í samráð við starvsfólk varð av trygdaráðum avgjørt at evakuera og lata staðið aftur. Rokið var tó ikki størri enn so, at tveir løgreglumenn megnaðu at fáa tamarhald á støðuni, og tíbetur var eingin skaði av bardaganum á Vertshúsinum.

Løgreglan upplýsir, at málið nú verður kannað, bæði við ljósi varpaðum á einstaklingarnar, sum voldu ófriðin, men eisini á Vertshúsið, sum við lóg hevur skyldu at varðveita húsfrið og hava trygdina í hásæti.

### Kundi hent sunnudag í kirkjuni

Annar stjórin á Vertshúsinum, Óla Svend Nolsøe, sigur, at slíkum er ein verjuleysur fyri.

- Slíkar hendingar kunnu tað saman fara fram sunnumorgun í kirkjuni, og talan var um vanligan vertshúsófrið uttan nakað álvarsamt, sigur Óla Svend. Eingin kom til skaða, og einki brotnaði inni á Vertshúsinum.

**HíS**

Leygardagur kl. 19.05:

### »Mary Celeste« – ein gáta av havinum

Ein dagin í november í 1872 fór amerikanska briggin »Mary Celeste« úr New York við kós ímóti Gibraltar-sundinum. Tríggjar vikur seinni varð skipið funnið rekandi norðan fyri Azorurnar. Tað vísti seg, at skipið var mannleyst, og hetta gjørdist byrjanin til eina sanna gátu.

Sunnudagur kl. 14.15:

### Framvið ánni



*Jógvan Gerðalíð*

Tað eru ikki so nógv ár síðan, Klaksvíkin ikki var býur. Men nú er alt broytt. Í hesi sendingini fer Jógvan Gerðalíð at greiða frá gomlum býlingum og hendingum framvið Borðoyavík. Fyrra sending.

Leygardagin kl. 17:

### Sjómansendingin Vitin

Í hesari aðru sendingini av hinari kanarisku oynni Tenerife, hoyra vit m.a. um, hvønn týdning hetta oyggjalandið í Atlantshavi hevði fyri rannsóknar- og handilsferðirnar hjá spaniólum og øðrum sjófarandi londum á sinni.

Eisini eru vit við, tá ið M. C. gongur og roynir at slota seg fram á slóðina hjá eini eldri havnakonu, sum vegna heilsusakir heldur til her suðuri í hitanum ein rúman part av árinum.

Læknin, Rodmundur í Liða sleppur at spæla eitthvørt slag av náttarravni, og tónleikurin í sendingini er merktur av hugadáminum um tað æviga várið í Himmiríki.

Endursent verður sunnudagin kl. 15 og hósdagin kl. 16.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Leygardagin 13.03. kl. $21^{00}$
Leygardagin 13.03. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 14.03. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 14.03. kl. $22^{30}$




**Billettprísur: 65,- kr.**
Leygardagin 13.03. kl. $16^{30}$
Leygardagin 13.03. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 14.03. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 14.03. kl. $18^{30}$




Leygardagin 13.03. kl. $19^{00}$
Leygardagin 13.03. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 14.03. kl. $20^{45}$




Leygardagin 13.03. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 14.03. kl. $23^{00}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Leygardagin 13.03. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 14.03. kl. $16^{30}$
– *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 23.04. kl. $18^{00}$
Fríggjadagin 23.04. kl. $20^{45}$
Fríggjadagin 23.04. kl. $23^{30}$
Leygardagin 24.04. kl. $18^{00}$
Leygardagin 24.04. kl. $20^{45}$
Leygardagin 24.04. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 25.03. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 25.03. kl. $19^{45}$
Sunnudagin 25.03. kl. $22^{30}$
Mánadagin 26.04. kl. $17^{00}$
Mánadagin 26.04. kl. $19^{45}$
Mánadagin 26.04. kl. $22^{30}$
Týsdagin 27.04. kl. $17^{00}$
Týsdagin 27.04. kl. $19^{45}$
Týsdagin 27.04. kl. $22^{30}$
Mikudagin 28.04. kl. $17^{00}$
Mikudagin 28.04. kl. $19^{45}$
Mikudagin 28.04. kl. $22^{30}$
Hósdagin 29.04. kl. $17^{00}$
Hósdagin 29.04. kl. $19^{45}$
Hósdagin 29.04. kl. $22^{30}$
**Forsølan er byrjað**